# Vit kunnu bara gita




*Tjaldur vónar nú, at Stjørnan vinnur á Neistanum tann 10. apríl. Tað er einasti møguleikin hjá steypavinnarunum at fáa pláss í finalunum um FM-heitið*

Mynd: Álavur Haraldsen

**HONDBÓLTUR** **Støðan hjá Tjaldur er ikki vónleys. Kvinnurnar úr Runavík skulu vinna útidystin á VB og heimadystin á VÍF. Eydnast tað, verður tað helst upp til Stjørnuna at gera av, hvørjum tær skulu spæla finalurnar ímóti. Tað ber framvegis ikki til at siga, hvørji lið fara í finalurnar**

Uni Holm Johannesen

Nú mátti røkka ella støkka hjá Tjaldur, varð sagt undan dystinum.

24-24. Tað høvdu fá væntað. Nú verður dúgliga gitt og rokna út, hvat fer at henda í finalustríðnum í bestu kvinnudeildini.

Treytirnar hjá Tjaldur eru einfaldar. Kvinnurnar úr Runavík skulu vinna sínar seinastu dystir. Eydnast tað, skal Stjørnan vinna á Neistanum í høllini á Hálsi tann 10. apríl. Fær Neistin stig, spæla bláu havnarkvinnurnar finalurnar.

### Durita var við

Tað var ikki vænta, at Durita Christophersen fór at spæla við Stjørnuni aftur í hesum kappingarárinum. Hon er flutt til Danmarkar. Venjarin hjá Stjørnuni, Svein Rógvi Ljósstein, hevur eisini víst aftur gitingunum, at landsliðsleikarin spældi afur í ár.

Durita Christophersen var við í Runavík í gjár. Tað var týðiligt, at hon er ikki eins væl fyri sum fyrr, men í Klaksvík verður sjálvsagt vóna, at hon finnur stórspælið fram aftur skjótast tilber. Hon tóktist troytt seinastu løtuna, men munaði væl í verjupartinum. Durita er stór og sterk, og tað gav týðiligar fyrimunur í løtum.

### Adina mansvard

Tað var lítið um Adinu Petru og hinar kvinnurnar úr Runavík, tá tær vitjaðu í Havn síðsta vikuskiftið. Neistin eyðmýkti tær og vann heili 40-19. Taptu tær aftur í dag, høvdu tær ongan virknan leiklut í finalustríðnum.

Adina Petra hevur verið darvað av sjúku, men var væl uppløgd hesaferð. Stjørnan ætlaði sær ikki at varðveita spenningin í oddastríðnum og legði nógv fyri at fáa fult. Petra var mansvard, og tað setti stundum kílar í álopsspælið hjá heimaliðnum. Hon stóð seg væl, hóast tað, og skeyt fleiri mál.

Annika Thomsen hevur verið skadd í hondini, og hon spældi heldur ikki við fullari megi í gjár. Hin stórspælarin, Simona Petersen, noyddist tískil av álvara at taka ábyrgd, og tað riggaði væl.

### Linligar stjørnur

Stjørnan spældi ikki serliga væl. Tað eydnaðist at taka broddin úr álopsspælinum hjá heimaliðnum, men tað hilnaðist ikki væl at hótta mótstøðuverjuna. Ov ofta var lítið hugflog, umframt at óneyðug mistøk darvaði spælinum. Tað varð skjótt greitt, at Stjørnan dúvaði upp á skjótálop.

Tjaldur hevði munin so at siga allatíðina. Heimaliðið var á odda fyri einum ella tveimum málum, men gestirnir togaðu seg upp undir liðina á teimum móti endanum. Tjaldur hevði síðstu skotroyndina í dystinum, men Adina Petra sendi framvið málinum.

### Tann 10. apríl

Stjørnan skal næstu dagarnar spæla móti VÍF og StÍF, sum hava myndað botnstríðið í bestu kvinnudeildini alt kappingarárið. Tað er helst ein avgreiðsluspurningur hjá kvinnunum úr Klaksvík. Greiður Tjaldur sína skyldu og vinnur á VB og VÍF, fellur avgerðin endaliga tann 10. apríl. Tá bresta Neistin og Stjørnan saman í høllini á Hálsi.

Verður tað so, at Tjaldur og Stjørnan vinna sínar dystir, og finaluliðini verða funnin tann 10. apríl, kann Stjørnan gera av, um Tjaldur ella Neistin skal í finaluna. Tað kann fáa ávirkan, at Stjørnan hevur longu vunnið seg í finaluna tá – og tískil einki hevur at spæla fyri móti Neistanum.

Tað ber til at gita. Um eina viku, tá Tjaldur hevur spælt í Vági, fáa vit fleiri upplýsingar til vega. Fyribils kunnu vit bara gita.

uni@sosialurin.fo



*Tað var ikki nógv Kyndilskvinnur fingið gjørt við VB*

Mynd: Álvur Haraldsen

# Eingin slingur í valsinum

**HONDBÓLT** **Barbara Brauer var ikki við, tá Neistin vann greitt á botnproppinum um vikuskiftið. VB bukaði Kyndil**

Uni Holm Johannesen

Tað var bara ein avgreiðsluspurningur, tá Neistin vitjaði í ítróttarhøllini á Skála seinnapartin leygardagin. Neistin vann 26-17.

Stórskjúttin Barbara Brauer, sum hevur verið millum allarbestu spælararnar í hesum kappingarárinum, var ikki við hesaferð. Hon hevur meitt sær fótin. Tað tóktist ikki darva spælinum stórvegis. Heimaliðið hótti ongantíð gestirnir, sum stríðast fyri at sleppa í finalurnar um føroyameistaraheitið.

Hinar ræddust ikki at taka ábyrgd. Jacklin Durhuus, sjey mál, Marjun Danberg, fimm mál, og Birita Wardum, fýra mál, gingu á odda í álopsspælinum. Rebekka Justinussen var einasta veruliga hóttanin hjá StÍF, men undantikið hennara skotstyrki, hevði heimaliðið lítið at bjóða.

### Ongan mun

VB vann sannførandi á Kyndli í høllini á Hálsi í gjár. Munurin var tólv mál – 24-36.

VB og Kyndil hava einki havt at spæla fyri, uttan æruna, í nógvar vikur. Tað merkist á spælinum. VB hevur av álvara fylt stigaposan seinastu tveir mánaðirnar, og tvey stig komu í skjáttuna aftur hesaferð.

## Seinastu dystirnir í Sunsetdeildini:

30. mars: VÍF - Stjørnan
3. apríl: VÍF – Kyndil
3. apríl: Stjørnan – StÍF
3. apríl: VB – Tjaldur
9. apríl: StÍF – VB
10. apríl: Neistin – Stjørnan
10. apríl: Tjaldur - VÍF

**Sunset Deildin** *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 23 | 657 | 514 | 143 | 36 |
| 2 | Stjørnan | 21 | 592 | 493 | 99 | 35 |
| 3 | Tjaldur | 22 | 616 | 532 | 84 | 33 |
| 4 | VB | 22 | 568 | 550 | 18 | 24 |
| 5 | Kyndil | 23 | 530 | 586 | -56 | 14 |
| 6 | VÍF | 21 | 473 | 586 | -113 | 7 |
| 7 | StÍF | 22 | 438 | 613 | -175 | 5 |

StÍF – Neistin 17-26
Kyndil – VB 24-36
Tjaldur – Stjørnan 24-24